Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

# Roknskapargreining fyri mjólkarvinnuna

## 2009 – 2016
## (2009/10 – 2016/17)

mars 2018

**INNIHALDSYVIRLIT**

**Síða**


**Frágreiðing** ........ 3

**Yvirlit yvir feløg, sum eru við í greiningini** ........ 5

**Rakstrarroknskapirnir 2009 – 2016 (2009/10 – 2016/17)** ........ 6

**Fíggjarstøðurnar við roknskaparársenda (31/12 og 30/6)** ........ 10

**Frágreiðing**

Í greiningini hava vit valt at hyggja at almennu ársroknskapunum hjá teimum mjólkarbøndum, sum hava lagt raksturin í smápartafeløg. Tað eru ikki øll smapartafeløgini við í greiningini fyri árini 2009 – 2013, tí tá vóru nøkur feløg, sum vóru um at gevast, og rakstrarroknskapirnir vóru í fleiri førum heilt óvanligir við sera stórum upp- og/ella niðurskrivingum. Hesar umleggingar kunnu ávirka meðaltølini.

Greiningin er fyrst og fremst gjørd til tey, ið starvast í hesi vinnuni, og annars tey, ið hava áhugamál í vinnuni. Tað eru ikki gjørdar djúptøknar útrokningar, sum møguligir peningastovnar og fíggjarfrøðingar gera, men tilfarið er tøkt, so hesir áhugabólkarnir kunnu gera sínar útrokningar.

Samanlagt hava hesir mjólkarbøndurnir latið MBM millum 75% og 90% tey fyrstu 4 árini, meðan tey hava innvigað millum 90% og 97% av samlaðu innvigingini hjá MBM tey seinru 4 árini. Tað merkir, at tað eru so at siga øll mjólkarvinnan við í greiningini hesi árini.

Í almennu ársroknskapunum eru ikki serliga nógvar upplýsingar, men tær vísa, hvussu raksturin í høvuðsheitum hevur hilnast tey einstøku árini, og hvussu rákið í vinnuni er. Sum í øðrum vinnum eru tað nakrir mjólkarbøndur, ið klára seg væl, meðan tað hjá øðrum ikki gongur so væl.

Í greiningini framgongur, at frá 2009 til 2011 versnaðu rakstrarúrslitini, men í 2012 og í 2013 vendi gongdin. Í 2014 er samlaða úrslitið lækkað munandi. Fyri árini 2012 -2017 verður ein serstakur stráfóðurstuðul latin landbúnaðarvinnuni. Tilsamans eru 24,0 mió.kr. játtaðar yvir 6 ár. Fyri at hesin stuðulin kann vera ein varandi hjálp hjá vinnuni er neyðugt, at ein partur verður brúktur at velta fyri. Men um tað skal muna nakað, skulu 500 hektarar veltast afturat sbr. Búnaðarstovuni. Við verandi veltistuðulsskipan, sum er 10 kr./fm, skulu 50 mió.kr. gjaldast í veltistuðli. Harafturat er neyðugt við uppdyrkingarvegum. Vanliga verður roknað við umleið 200 metrum fyri hvønn hektar. Tvs. at talan er um 10 km av uppdyrkingarvegi.

Hóast vinnan hevur fingið eyka stráfóðurstuðul, er samlaða úrslitið fyri øll 24 - 26 feløgini bert omanfyri 4,0 mió.kr. í 2012 (2012/13) og so aftur í 2015 (2015/16) og 2016 (2016/17). Afturat mjólkarstuðlinum er mjólkarprísurin til bøndurnar hækkaður við 0,20 kr./l síðani síðst í 2014. Tað sæst aftur hjá teimum, ið hava brotið roknskaparár. Harafturat er kraftfóðurprísurin lækkaður nakað, sum ein nærri greining, ið JANUAR P/F hevur gjørt fyri 11 - 14 mjólkarbøndur, vísir.

Tann greiningin, sum JANUAR P/F hevur gjørt fyri 11 – 14 mjólkarbøndur, er gjørd út frá innanhýsis roknskapum hjá hesum mjólkarbøndum. Henda greiningin vísir m.a., at tann roknskaparposturin, ið nevnist "aðrar inntøkur" er øktur munandi síðani 2012 (2012/13). Serliga í 2016 (2016/17) er hesin inntøkuposturin knappar kr. 150.000 í meðal. Hetta eru serliga inntøkur frá maskinrakstri o.t.

Tað er onki at ivast í, at um mjólkarvinnan skal kunna gerast effektiv, skal vinnan gerast nútíðarhóskandi. Tað merkir, at munandi íløgur skulu gerast í fjós, køstar o.t. Harafturat verður neyðugt at velta nógv, fyri at fáa nóg mikið av stráfóðri, men eisini fyri at kunna gagnnýta tøðini best møguligt. Um hetta skal kunna gjøgnumførast er alneyðugt, at ein heilt klár politiskt kós verður sett, og at allar kreftir í landbúnaðinum fylkjast um settu kósina. Her verður hugsað bæði um teir almennu og teir privatu stovnarnar, so sum Búnaðarstovuna, Búnaðargrunnin, MBM og Bóndafelag Føroya.

Í aðrari greining, sum JANUAR hevur gjørt, við støði í 11 - 14 innanhýsis roknskapum, eru fleiri áhugaverdar upplýsingar, sum lýsa gongdina í mjólkarvinnuni nærri. Báðar greiningarnar er á heimasíðuni hjá JANUAR P/F – www.januar.fo. Har eru eisini greinigar fleiri á aftur í tíðina.

Tórshavn, tann 31. mars 2018

**P/F JANUAR**
løggilt grannskoðanarvirki

Jógvan Amonsson
statsaut. revisor

**Yvirlit yvir feløg, sum eru við í greiningini**

Niðanfyri framgongur hvørji feløg talan er um. Eisini sæst hvat roknskaparár feløgini brúka. Nøkur íognarfeløg eru í vinnuni, men í greiningini eru roknskapirnir hjá íognarunum brúktir, tí ikki allir roknskapirnir hjá íognarfeløgunum eru tøkir.

| | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal á roknskapum | 26 | 26 | 26 | 26 | 25 | 26 | 25 | 24 |
| Sp/f Beitisgarður | X | X | X | X | X | X | X | X |
| Sp/f Drívá | X | X | X | X | X | X | X | X |
| Sp/f Fungugarður | X | X | X | X | X | | | |
| Sp/fGarðurin í Búðini | X | X | X | X | X | X | X | X |
| Sp/f Hoyvíksgarður/Navarhorn | X | X | X | X | X | X | X | X |
| Sp/f Miðstovugarðurin | X | X | X | X | X | X | X | X |
| Sp/f MS Landbúnaður | X | X | X | X | X | X | X | X |
| Sp/f Heimistova | X | X | X | X | X | X | X | X |
| Sp/fÍ Grønunum | X | X | X | X | X | X | | |
| Sp/f Ólavur Andreaen | X | X | X | X | X | X | X | X |
| Sp/f Mørkin | X | X | X | X | | | | |
| Sp/f Sólgarðar | X | X | X | X | X | X | X | X |
| Sp/f ROJH | X | X | X | X | X | X | X | X |
| Sp/f Oyrareingjagarður | X | X | X | X | X | X | X | X |
| Sp/f Varmakelda | X | X | X | X | X | X | X | X |
| Sp/f Uttastovugarðurin | X | X | X | X | X | X | X | X |
| Sp/f Fjósið á Viðareiði | | | | | | X | X | X |

| | 2009/10 | 2010/11 | 2011/12 | 2012/13 | 2013/14 | 2014/15 | 2015/16 | 2016/17 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Sp/f Fríðdalur | X | X | X | X | X | X | X | X |
| Sp/f Hamarsgarður | X | X | X | X | X | X | X | X |
| Sp/f Hvíthjallar | X | X | X | X | X | X | X | X |
| Sp/f Húsgarður | X | X | X | X | X | X | X | X |
| Sp/f Klettagarður | X | X | X | X | X | X | X | X |
| Sp/f Hoygarðurin | X | X | X | X | | | | |
| Sp/f Müllersgarður | X | X | X | X | X | X | X | X |
| Sp/f Tinggarðurin/Svartá | X | X | X | X | X | X | X | X |
| Sp/f á Steinum | X | X | X | X | X | X | X | X |
| Sp/f Torvlaðgarður | X | X | X | X | X | X | X | |
| Sp/f Eyðanstovugarður | | | | | X | X | X | X |
| Sp/f Fjósið í Leirvík | | | | | | X | X | X |

## Rakstrarroknskapirnir 2009 – 2016 (2009/10 – 2016/17)

Niðanfyri standandi talva vísir rakstrarroknskapirnar tilsamans hjá feløgunum í 1.000 kr.

| | Tilsamans í 1.000 kr. | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tál á roknskapum | 26 | 26 | 26 | 26 | 25 | 26 | 25 | 24 |
| | 2009/10 og 2009 | 2010/11 og 2010 | 2011/12 og 2011 | 2012/13 og 2012 | 2013/14 og 2013 | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 | 2016/17 og 2016 |
| Bruttoúrslit | 10.942 | 10.758 | 10.229 | 10.934 | 15.586 | 16.888 | 18.375 | 20.521 |
| Starvsfólkakostnaður | -4.014 | -3.828 | -4.519 | -4.421 | -4.273 | -6.086 | -7.626 | -7.372 |
| Avskrivingar | -2.808 | -2.608 | -2.672 | -5.685 | -5.229 | -6.785 | -5.354 | -5.534 |
| **Rakstrarúrslit** | **4.120** | **4.322** | **3.038** | **828** | **6.084** | **4.017** | **5.396** | **7.615** |
| Inntøka frá kapitalpørtum í dótturfeløgum | 570 | -46 | -290 | 827 | 870 | 335 | 538 | 852 |
| Fíggjarligar inntøkur | 86 | 59 | 77 | 2.017 | 20 | 12 | 1.261 | 4 |
| Fíggjarligir kostnaðir | -1.864 | -1.793 | -1.763 | -1.864 | -1.594 | -1.798 | -1.602 | -1.472 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **2.912** | **2.543** | **1.062** | **1.808** | **5.380** | **2.565** | **5.593** | **6.999** |
| Skattur | -423 | -598 | -208 | -357 | -1.090 | -533 | -1.039 | -1.345 |
| **Ársúrslit** | **2.489** | **1.945** | **854** | **1.451** | **4.290** | **2.033** | **4.554** | **5.654** |

Um omanfyri standandi roknskapir verða umarbeiddir eitt sindur sæst, at avlopið til fíggjarkostnað (rentur og avskrivingar) og skatt, tað sokallaða EBITDA, er sum niðanfyri víst:

| | 2009/10 og 2009 | 2010/11 og 2010 | 2011/12 og 2011 | 2012/13 og 2012 | 2013/14 og 2013 | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 | 2016/17 og 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| EBITDA tilsamans | 6.928 | 6.930 | 5.710 | 6.513 | 11.314 | 10.802 | 10.750 | 13.149 |
| Hægsta EBITDA | 875 | 779 | 800 | 1.012 | 1.630 | 1.025 | 1.382 | 1.924 |
| Lægsta EBITDA | -237 | -312 | -226 | -296 | -499 | -17 | -61 | -103 |

Sum tað klárt framgongur, so vóru úrslitini lækkandi fram til 2011 (2011/12), men hækkaðu síðani aftur 2013, fyri síðani at lækka nakað í 2014, men hækkaðu heilt nógv í 2015 og í 2016. Í hesum 8 ára tíðarskeiðnum hevur samlaða rakstrarúrslitið ikki verið so gott sum tvey tey seinastu árini, og serstakliga 2016 royndist heilt væl. Í 2016 vóru tað bert 2 feløg, sum høvdu rakstrarhall. Øll hini árini hava tað verið millum 6 og 9 feløg, sum hava havt rakstrarhall.

Nevnast skal, at seinastu 5 árini er eyka stráfóðurstuðul latin bóndunum. Hesin eyka stráfóðurstuðulin er játtaður fram til og við 2017. Tilsamans verða 24,0 mió.kr. goldnar úr Búnaðargrunninum til henda stuðulin. Hesin stuðulin er ikki treytaður av nøkrum. Sum støðan er í vinnuni, eru tað sbr. Búnaðarstovuni, neyðugt at nýta stórar upphæddir at velta meiri bø fyri, tí nógvar mjólkarkvotur eru seldar seinastu árini. Hetta førir so við sær, at tann gamli bøurin, har

mjólkarkvotan var, nú liggur óvirkin, meðan keypararnir ikki hava velt nóg mikið. Tí er neyðugt hjá nógvum mjólkarbóndum at keypa hoyggj úr útheiminum, serliga úr Danmark og Íslandi. Búnaðarstovan mælir til, at einir 500 hektarar verða veltir afturat. Higartil eru ikki nógv kúfóður velt síðani eyka stráfóðurstuðulin varð innførdur. Henda støðan hevur verið nógv umrødd, og nógv uppskot hava verið frammi um, hvussu hesin óvirkni bøurin kann gagnnýtast, men higartil er onki ítøkiligt gjørt við tað.

Tey seinastu árini eru nógvar broytingar hendar í mjólkarvinnuni. Talið á mjólkarbóndum er lækkað munandi. Seinastu 8 árini, sum henda greiningin fevnir um, eru eisini nakrar broytingar farnar fram. Men talið á mjólkargørðum hevur tó verið rættiliga støðugt hesi árini. Tað eru framvegis rembingar í mjólkarvinnuni, so tað er ikki óhugsandi, at tann gongdin, sum hevur verið, har fjósini gerast størri og størri, fer at halda fram. Í løtuni eru 4 mjólkitólmenni í landinum í trimum stórum og nýggjum fjósum. Tað tykist sum um mólkitólmennini klára millum 500.000 og 600.000 litrar hvørt árliga. Tann samlaða mjólkarmongdin, ið Meginfelag Búnaðarmanna hevur tikið ímóti, hevur verið umleið 7,3 mió. litrar árliga. Um øll vinnan varð umløgd, hevði tað verið nóg mikið við 14 mjólkitólmennum.

Niðanfyri eru bestu og vánaligastu ársúrslitini fyri tíðarskeiðið víst:

| | 2009/10 og 2009 | 2010/11 og 2010 | 2011/12 og 2011 | 2012/13 og 2012 | 2013/14 og 2013 | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 | 2016/17 og 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Hægsta ársúrslit | 637 | 482 | 504 | 668 | 1.153 | 536 | 1.519 | 1.238 |
| Lægsta úrslit | -372 | -441 | -511 | -862 | -177 | -811 | -166 | -51 |

Tey vánaligastu úrslitini í árunum 2009 – 2011 eru frá gørðum, sum eru um at gevast, meðan tey vánaligastu úrslitini í 2012 og 2014 standast av serligum niðurskrivingum. Tað sæst, at tey frægastu úrslitini eru góð.

Niðanfyri eru meðalúrslitini fyri hvønn mjólkarbónda.

**Rakstrarroknskapir fyri meðalgarðin í 1.000 kr.**

| | 2009/10 og 2009 | 2010/11 og 2010 | 2011/12 og 2011 | 2012/13 og 2012 | 2013/14 og 2013 | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 | 2016/17 og 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Bruttoúrslit | 421 | 414 | 393 | 421 | 623 | 650 | 735 | 855 |
| Starvsfólkakostnaður | -154 | -147 | -174 | -170 | -171 | -234 | -305 | -307 |
| Avskrivingar | -108 | -100 | -103 | -219 | -209 | -261 | -214 | -231 |
| | | | | | | | | 0 |
| **Rakstrarúrslit** | **158** | **166** | **117** | **32** | **243** | **154** | **216** | **317** |
| | | | | | | | | 0 |
| Inntøka frá kapitalpørtum í dótturf. | 22 | -2 | -11 | 32 | 35 | 13 | 22 | 36 |
| Fíggjarligar inntøkur | 3 | 2 | 3 | 78 | 1 | 0 | 50 | 0 |
| Fíggjarligir kostnaðir | -72 | -69 | -68 | -72 | -64 | -69 | -64 | -61 |
| | | | | | | | | 0 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **112** | **98** | **41** | **70** | **215** | **99** | **224** | **292** |
| | | | | | | | | 0 |
| Skattur | -16 | -23 | -8 | -14 | -44 | -20 | -42 | -56 |
| | | | | | | | 0 | 0 |
| **Ársúrslit** | **96** | **75** | **33** | **56** | **172** | **78** | **182** | **236** |

Sum tað týðiliga framgongur, so lækkaði meðalúrslitið fram til 2011, øktist nakað í 2012 og øktist nógv í 2013, men er so fallið aftur í 2014, fyri aftur at økjast í 2015 og í 2016. Sum tað sæst, so er starvsfólkakostnaðurin, tvs. lønir og lønargjøld, millum kr. 12.500 og kr. 15.000 um mánaðin fram til 2013, men er hækkað í 2014 til kr. 19.000 um mánaðin, og í 2015 til kr. 23.400 um mánaðin og í 2016 til kr. 25.600 um mánaðin. Hóast starvsfólkakostnaðurin er hækkaður, er hann enn sera lágur, tí í einum mjólkarfjósi krevst vanliga meiri enn eitt ársverk.

Niðanfyri sæst hvussu nógv meðalgarðurin hevur eftir til fíggjarkostnað tey einstøku árini. Eisini sæst, hvussu nógv tann besti garðurin hevur til fíggjarkostnað í teimum einstøku árunum, og hvussu nógv tann vánaligasti garðurin hevur til fíggjarkostnað. Nevnast skal, at tað ikki er tann sami garðurin, sum hevur tað frægasta úrslitið á hvørjum ári. Og heldur ikki er tað sami garður, sum er vánaligastur øll árini.

| | 2009/10 og 2009 | 2010/11 og 2010 | 2011/12 og 2011 | 2012/13 og 2012 | 2013/14 og 2013 | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 | 2016/17 og 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| EBITDA | 266 | 267 | 220 | 251 | 453 | 415 | 430 | 548 |
| Hægsta EBITDA | 875 | 779 | 800 | 1.012 | 1.630 | 1.025 | 1.382 | 1.924 |
| Lægsta EBITDA | -237 | -312 | -226 | -296 | -499 | -17 | -61 | -103 |

Sum tað sæst frammanfyri, so er samlaða úrslitið hækkað munandi, hóast starvsfólkakostnaðurin hevur verið hægri. Men hóast vinnan hevur fingið 4,0 mió.kr. í stráfóðurstuðli, so er samlaða úrslitið lægri enn tað. Samlaða úrslitið hjá hesum 24 - 26 mjólkarbóndunum var 5,6 mió.kr. í 2016 (2016/17). Tá skal havast í huga, at hjá 14 teirra, stava 2,1 mió.kr. frá øðrum inntøkum, so sum maskinrakstri o.t.

Meðalprísurin á mjólkini er hækkaður nakað, samstundis sum kraftfóðurprísurin pr. litur mjólk í meðal er lækkaður. Í eini nærri greining, sum JANUAR P/F hevur gjørt , grundað á 11 – 14 innanhýsis roknskapir, framgongur, at kraftfóðurprísurin í meðal er lækkaður úr 2,10 kr. pr. litur mjólk í 2012 niður í 1,69 kr./l mjólk í 2016. Við eini samlaðari mjólkarframleiðslu upp á 7,3 mió. litrar, merkir henda lækkingin ein minnikostnað upp á knappar 3,0 mió.kr. hjá mjólkarvinnuni.

Samanumtikið sæst, at mjólkarprísurin er hækkaður, prísurin á keyptum fóðri er lækkaður, samstundis, sum fleiri bøndur hava økt um aðrar inntøkur. Hetta sæst eisini aftur, tí samlaða úrslitið fyri mjólkarvinnuna er økt hesi seinru árini.

Men nakrir kostnaðir eru tó øktir. Tað eru serliga lønir, viðlíkahald og avskrivingar, ið eru økt. Lønirnar eru øktar, av tí, at tær millumrokningarnar, sum bøndur fingu við felagið, tá raksturin varð lagdur í eitt felag við árenda 2006, nú eru afturgoldnar hjá fleiri bóndum. Tað eru fleiri bøndur, sum hava livað av hesum millumrokningum, men nú mugu teir fáa løn frá feløgunum. Flestu fjósini í vinnuni er gomul, nøkur eru heilt gomul og niðurslitin, tí er neyðugt við stórum viðlíkahaldskostnaði. Nakrar íløgur eru gjørdar í serstakliga leysafæ, men eisini í mjólkarkvotur, sum gera, at avskrivingarnar eru hækkaðar.

Í stabbamyndini niðanfyri sæst, hvussu kostnaðirnir hava verið seinastu árini. Samlaði stabbin vísir samlaða bruttoúrslitið hjá meðalgarðinum. Tað sæst týðiliga, at samlaða bruttoúrslitið lækkaði árini 2009 – 2011, men er hækkað síðani tá. Hetta kemst serliga av eyka stráfóðurstuðlinum, og at mjólkarprísurin er hækkaður nakað í 2015, samstundis sum fóðurkostnaðurin er lækkaður.



## Fíggjarstøðurnar við roknskaparársenda (31/12 og 30/6)

Niðanfyri eru ognirnar tilsamans vístar hjá hesum mjólkarbóndunum.

| | Tilsamans | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fíggjarstøða 30/6 og 31/12** | | | | | | | | |
| | 2009/10 | 2010/11 | 2011/12 | 2012/13 | 2013/14 | 2014/15 | 2015/16 | 2016/17 |
| **OGN** | og 2009 | og 2010 | og 2011 | og 2012 | og 2013 | og 2014 | og 2015 | og 2016 |
| Mjólkarkvotur | 53.666 | 49.116 | 49.823 | 47.691 | 39.362 | 36.071 | 33.587 | 32.326 |
| Good-will | 0 | 0 | 0 | 2.500 | 2.500 | 2.773 | 2.743 | 2.842 |
| **Immateriell støðisogn** | **53.666** | **49.116** | **49.823** | **50.191** | **41.862** | **38.844** | **36.330** | **35.169** |
| | | | | | | | | |
| Bygningar | 2.053 | 1.912 | 1.618 | 1.775 | 4.360 | 5.632 | 9.072 | 9.809 |
| Rakstrargøgn | 11.974 | 12.030 | 12.776 | 12.167 | 11.463 | 13.762 | 15.208 | 16.363 |
| Kríatúr | 3.978 | 4.175 | 4.266 | 4.180 | 4.274 | 5.267 | 5.591 | 5.166 |
| **Materiell støðisogn** | **18.006** | **18.117** | **18.660** | **18.123** | **20.097** | **24.660** | **29.871** | **31.338** |
| | | | | | | | | |
| Kapitalpartar | 273 | 711 | 869 | 843 | 1.465 | 1.362 | 350 | 364 |
| Onnur virðisbrøv | 34 | 31 | 34 | 34 | 49 | 30 | 40 | 40 |
| Egin partabrøv | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Fíggjarlig støðisogn** | **307** | **742** | **903** | **876** | **1.514** | **1.392** | **390** | **404** |
| | | | | | | | | |
| **Støðisogn tilsamans** | **71.978** | **67.975** | **69.386** | **69.190** | **63.472** | **64.896** | **66.590** | **66.910** |
| | | | | | | | | |
| Rávørur og hjálpitilfar | 22 | 28 | 26 | 25 | 20 | 186 | 186 | 205 |
| Vøru- og tænastuogn | 3.027 | 2.588 | 2.284 | 3.405 | 2.685 | 2.807 | 2.561 | 2.670 |
| Áogn hjá atknýttum feløgum | 872 | 3.651 | 3.516 | 947 | 2.990 | 989 | 2.179 | 1.181 |
| Virðisbrøv | 7 | 6 | 4 | 4 | 7 | 6 | 7 | 7 |
| Tíðaravmarkingar | 211 | 90 | 54 | 362 | 28 | 29 | 27 | 405 |
| Onnur áogn | 2.830 | 3.028 | 2.781 | 2.600 | 2.671 | 3.132 | 2.935 | 4.246 |
| **Áogn tilsamans** | **6.970** | **9.391** | **8.664** | **7.343** | **8.399** | **7.148** | **7.895** | **8.714** |
| | | | | | | | | |
| Peningur | 1.596 | 2.489 | 2.254 | 2.741 | 5.250 | 5.149 | 5.033 | 7.738 |
| | | | | | | | | |
| **Ogn í umferð tilsamans** | **8.566** | **11.880** | **10.918** | **10.084** | **13.650** | **12.297** | **12.928** | **16.452** |
| | | | | | | | | |
| **OGN TILSAMANS** | **80.544** | **79.855** | **80.304** | **79.274** | **77.122** | **77.193** | **79.518** | **83.363** |

Her sæst, at mjólkarkvoturnar hjá hesum mjólkarbóndunum eru lækkaðar við góðum 20 mió.kr. hesi 8 árini. Ein partur av frágreiðingini er, at nakrir bøndur hava selt mjólkarkvotuna, tí teir eru um at gevast í vinnuni. Í nøkrum førum eru mjólkarkvoturnar seldar fyri eina lægri upphædd, enn tær vórðu keyptar fyri. Ein onnur frágreiðing er, at mjólkarkvoturnar eru niður- og/ella avskrivaðar. Hóast tað, so er samlaða virðið á mjólkarkvotunum góð 48% av samlaðu støðisognini í 2016. Í 2009 var virðið á mjólkarkvotunum knøpp 75% av samlaðu støðisognini.

Íløgurnar í fastogn og rakstrartól hava verið sera lítlar hesi árini. Men í árunum 2014 – 2016 hava hesir mjólkarbøndurnir gjørt íløgur fyri tilsamans 20,0 mió.kr., sum eisini fær ávirkan á gjørdu avskrivingarnar.

# Ognin hjá meðalmjólkarfjósinum er henda:

| | Í meðal í 1.000 kr. | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2009/10 | 2010/11 | 2011/12 | 2012/13 | 2013/14 | 2014/15 | 2015/16 | 2016/17 |
| **OGN** | og 2009 | og 2010 | og 2011 | og 2012 | og 2013 | og 2014 | og 2015 | og 2016 |
| Mjólkarkvotur | 2.064 | 1.889 | 1.916 | 1.834 | 1.574 | 1.387 | 1.343 | 1.347 |
| Good-will | 0 | 0 | 0 | 96 | 100 | 107 | 110 | 118 |
| **Immateriell støðisogn** | **2.064** | **1.889** | **1.916** | **1.930** | **1.674** | **1.494** | **1.453** | **1.465** |
| Bygningar | 79 | 74 | 62 | 68 | 174 | 217 | 363 | 409 |
| Rakstrargøgn | 461 | 463 | 491 | 468 | 459 | 529 | 608 | 682 |
| Kríatúr | 153 | 161 | 164 | 161 | 171 | 203 | 224 | 215 |
| **Materiell støðisogn** | **693** | **697** | **718** | **697** | **804** | **948** | **1.195** | **1.306** |
| Kapitalpartar | 11 | 27 | 33 | 32 | 59 | 52 | 14 | 15 |
| Onnur virðisbrøv | 1 | 1 | 1 | 1 | 2 | 1 | 2 | 2 |
| Egin partabrøv | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Fíggjarlig støðisogn** | **12** | **29** | **35** | **34** | **61** | **54** | **16** | **17** |
| **Støðisogn tilsamans** | **2.768** | **2.614** | **2.669** | **2.661** | **2.539** | **2.496** | **2.664** | **2.788** |
| Rávørur og hjálpitilfar | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 7 | 7 | 9 |
| Vøru- og tænastuogn | 116 | 100 | 88 | 131 | 107 | 108 | 102 | 111 |
| Áogn hjá atknýttum feløgum | 34 | 140 | 135 | 36 | 120 | 38 | 87 | 49 |
| Virðisbrøv | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Tíðaravmarkingar | 8 | 3 | 2 | 14 | 1 | 1 | 1 | 17 |
| Onnur áogn | 109 | 116 | 107 | 100 | 107 | 120 | 117 | 177 |
| **Áogn tilsamans** | **268** | **361** | **333** | **282** | **336** | **275** | **316** | **363** |
| Peningur | 61 | 96 | 87 | 105 | 210 | 198 | 201 | 322 |
| **Ogn í umferð tilsamans** | **329** | **457** | **420** | **388** | **546** | **473** | **517** | **686** |
| **OGN TILSAMANS** | **3.098** | **3.071** | **3.089** | **3.049** | **3.085** | **2.969** | **3.181** | **3.473** |




Tað framgongur týðiliga, at tann immateriella ognin (mjólkarkvotan) er lækkað (tann blái parturin av stabbanum) seinastu árini, meðan íløgan í maskinur og tól er hækkað nakað. Ognin í umferð (tann guli parturin av stabbanum), tvs útistandandi hjá viðskiftafólki og innistandandi peningur í peningastovnum hevur verið støðug. Tann samlaða ognin er tó hækkað nakað seinastu árini.

Skyldurnar tilsamans hjá hesum mjólkarbóndunum eru vístar niðanfyri:

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Aðrar avsetingar | 1.431 | 0 | 0 | 0 | 25 | 126 | 322 | 322 |
| **Avsetingar tilsamans** | **3.286** | **2.120** | **2.191** | **2.479** | **2.811** | **3.038** | **3.675** | **4.348** |
| Langfreistað skuld | 16.480 | 14.811 | 15.396 | 14.067 | 18.575 | 21.804 | 20.507 | 20.127 |
| Stuttfreistað skuld | 3.340 | 2.894 | 2.868 | 5.213 | 3.934 | 2.930 | 3.423 | 4.593 |
| Bankaskuld | 815 | 1.073 | 1.110 | 2.390 | 931 | 277 | 146 | 337 |
| Vøru- og tænastuskuld | 3.914 | 5.414 | 4.786 | 5.626 | 4.859 | 5.166 | 5.074 | 5.416 |
| Skuld til atknýtt feløg/nærstandandi | 32.674 | 30.833 | 28.970 | 25.223 | 20.476 | 16.184 | 15.100 | 12.810 |
| Partafelagsskattur | 367 | 358 | 318 | 175 | 332 | 577 | 500 | 589 |
| Tíðaravmarkingar | 251 | 0 | 0 | 0 | 0 | 38 | 413 | 493 |
| Onnur skuld | 4.586 | 4.947 | 5.618 | 5.088 | 5.385 | 4.462 | 3.782 | 3.988 |
| Stuttfreistað skuld tilsamans | 45.948 | 45.519 | 43.670 | 43.716 | 35.916 | 29.635 | 28.438 | 28.225 |
| **Skuld tilsamans** | **62.428** | **60.330** | **59.066** | **57.783** | **54.492** | **51.438** | **48.945** | **48.352** |
| **SKYLDUR TILSAMANS** | **80.544** | **79.855** | **80.304** | **79.274** | **77.122** | **77.193** | **79.518** | **83.363** |
| | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | 2009/10 og 2009 | 2010/11 og 2010 | 2011/12 og 2011 | 2012/13 og 2012 | 2013/14 og 2013 | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 | 2016/17 og 2016 |
| Trygdarleikastig | 18,4% | 21,8% | 23,7% | 24,0% | 25,7% | 29,4% | 33,8% | 36,8% |

Trygdarleikastigið, sum sigur frá, hvussu stóran part eginognin fíggjar av samlaðu ognini hjá hesum mjólkarbóndunum hesi árini, er:

| | 2009/10 og 2009 | 2010/11 og 2010 | 2011/12 og 2011 | 2012/13 og 2012 | 2013/14 og 2013 | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 | 2016/17 og 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Trygdarleikastig | 18,4% | 21,8% | 23,7% | 24,0% | 25,7% | 29,4% | 33,8% | 36,8% |

Eginognin er økt samstundis, sum bæði tann langfreistaða og tann stuttfreistaða skuldin eru lækkaðar, og tí er trygdarleikastigið hækkað.

Men verður hugt nærri at roknskaparpostinum "Skuld til atknýtt feløg/nærstandandi" sæst, at tað serliga er henda skuldin, ið er lækkað. Í hesi skuldini er millumrokningin, sum mjólkarbøndurnir fingu, tá feløgini vórðu stovnað í 2006 og keyptu mjólkarkvotuna frá bóndanum. Hjá teimum flestu var hetta áðrenn 1/1-2007. Um lækkingin verður samanhildin við "Starvsfólkakostnaðin", er tað nakað, sum bendir á, at bøndurnir lutvíst hava livað av millumrokningini, heldur enn at fáa sær løn. Tí eru rakstrarroknskapirnir betri enn teir áttu at verið, um øll arbeiðsmegin varð lønt. Hjá nøkrum mjólkarbondum sæst, at hesar millumrokningarnar skjótt eru brúktar. Tað fer at merkja, at í framtíðini mugu bøndurnir eisini fáa meiri í løn frá feløgunum. Í eini neyvari grein, sum P/F JANUAR hevur gjørt sæst, at henda gongdin hevur tikið dyk á seg einastu árini.

Myndin er greiðari niðanfyri, har skuldin hjá meðalmjólkarbóndanum er víst:

| | Í meðal í 1.000 kr. | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2009/10 | 2010/11 | 2011/12 | 2012/13 | 2013/14 | 2014/15 | 2015/16 | 2016/17 |
| **SKYLDUR** | og 2009 | og 2010 | og 2011 | og 2012 | og 2013 | og 2014 | og 2015 | og 2016 |
| Partapeningur | 82 | 82 | 82 | 82 | 82 | 85 | 85 | 85 |
| Uppskrivingargrunnar | 3 | 3 | 3 | 4 | 4 | 4 | 4 | 2 |
| Flutt úrslit | 485 | 585 | 648 | 646 | 707 | 785 | 987 | 1.191 |
| **Eginogn tilsamans** | **570** | **669** | **733** | **731** | **793** | **874** | **1.076** | **1.278** |
| | | | | | | | | |
| Útsettur skattur | 71 | 82 | 84 | 95 | 111 | 112 | 134 | 168 |
| Aðrar avsetingar | 55 | 0 | 0 | 0 | 1 | 5 | 13 | 13 |
| **Avsetingar tilsamans** | **126** | **82** | **84** | **95** | **112** | **117** | **147** | **181** |
| | | | | | | | | |
| Langfreistað skuld | 634 | 570 | 592 | 541 | 743 | 839 | 820 | 839 |
| | | | | | | | | |
| Stuttfreistað skuld | 128 | 111 | 110 | 201 | 157 | 113 | 137 | 191 |
| Bankaskuld | 31 | 41 | 43 | 92 | 37 | 11 | 6 | 14 |
| Vøru- og tænastuskuld | 151 | 208 | 184 | 216 | 194 | 199 | 203 | 226 |
| Skuld til atknýtt feløg/nærstandandi | 1.257 | 1.186 | 1.114 | 970 | 819 | 622 | 604 | 534 |
| Partafelagsskattur | 14 | 14 | 12 | 7 | 13 | 22 | 20 | 25 |
| Tíðaravmarkingar | 10 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 17 | 21 |
| Onnur skuld | 176 | 190 | 216 | 196 | 215 | 172 | 151 | 166 |
| Stuttfreistað skuld tilsamans | 1.767 | 1.751 | 1.680 | 1.681 | 1.437 | 1.140 | 1.138 | 1.176 |
| | | | | | | | | |
| **Skuld tilsamans** | **2.401** | **2.320** | **2.272** | **2.222** | **2.180** | **1.978** | **1.958** | **2.015** |
| | | | | | | | | |
| **SKYLDUR TILSAMANS** | **3.098** | **3.071** | **3.089** | **3.049** | **3.085** | **2.969** | **3.181** | **3.473** |



| | 2009/10 og 2009 | 2010/11 og 2010 | 2011/12 og 2011 | 2012/13 og 2012 | 2013/14 og 2013 | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 | 2016/17 og 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Eginogn | 570 | 669 | 733 | 731 | 793 | 874 | 1.076 | 1.278 |
| Millumrokning við nærstandandi | 1.257 | 1.186 | 1.114 | 970 | 819 | 622 | 604 | 534 |
| Ogn hjá bóndunum tilsamans | 1.827 | 1.855 | 1.847 | 1.701 | 1.612 | 1.496 | 1.680 | 1.811 |

Omanfyri er samlaði ágóðin hjá bóndunum í feløgunum. Her sæst, at eginognin og millumrokningin hava verið sera støðug hesi árini. Tað sæst, at millumrokningarnar eru lækkaðar, meðan eginognin er hækkað. Tað merkir, at bøndurnir hava heldur hevað av millumrokningini enn at útgjalda sær løn. Sjálvsagt verður skatturin lægri, men uppsparingin verður spakuliga brúkt.

Sum heild kann sigast, at greiningin vísir, at raksturin er batnaður seinru árini, men hetta kemst einamest av, at stráfóðurstuðulin og aðrar inntøkur eru hækkaðar, keypt fóður er lækkað. Tó eru lønir, viðlíkahald av fjósum og avskrivingar hækkað.

Tað merkir, at tað ikki eru rationaliseringar, sum hava ført til eitt betri rakstrarúrslit. Skal mjólkarvinnan kunna gerast effektivari, er neyðugt við munandi íløgum í nýggj nútíðarfjós, samstundis sum neyðugt er at velta meiri og gagnnýta ta veltu jørðina betur.